Sorgarleikurin í NOREGI

Lagt til rættis: Rógvi Nybo, rogvi@sosialurin.fo *Grafikkur: VG Nett*



1 Bilbumba: Her rakar bilbumban Regjeringskvartalet fríggjadagin 22. Juli klokkan 15.26. Tveir minuttir seinni verður ein persónur í løgreglubúna sæddur við ein vøruvogn

2 Tað tekur umleið 35 minuttir at koyra úr Oslo til Utøya við bili

3 Behring Breivik stillar ein silvurgráan vøruvogn við ferjuleguna

4 Anders Behring Breivik kom við báti til bryggjuna á Utøya. Hann var í løgreglubúna, skottryggum vesti og var vápnaður. Hann vísti løgreglusamleikaprógv og greiddi vaktunum hjá AUF á meginlandinum, at hann varð sendur fyri at kanna trygdina, og at hetta var vanlig mannagongd í samband við yvirgangsálopið í høvuðsstaðnum

5 Sambært vitnum byrjaði Breivik at skjóta umleið 30 sekund eftir at hann steig á oynna. Hann er gingin móti kioskini, sum liggur eitt hanagleiv haðani og er hildin áfram at skjóta

6 Hundraðtals ungdómar vóru savnaðir í høvuðshúsinum fyri at verða kunnaði um støðuna í Oslo. Tey hoyrdu skot. Breivik nærkaðist høvuðsútgongdini, í løgreglubúnanum, og royndi at lokka tey ungu til sín við at siga, "eg vil gjarna savna øll, kom her". Tey, ið nærkaðust, vórðu skotin

7 Breivik skeyt við maskinbyrsu og revolvara. Hann gekk runt alla oynna og skeyt, bæði tey sum royndu at svimja inn til meginlandið, og tey, ið royndu at goyma seg í skóginum ella í teltunum. Hann skeyt inn í rúmini í høvuðshúsinum. Eftir honum lógu lík spjadd kring alla oynna, meginparturin við høvuðshúsið, kaféhúsið, við sjóvarmálan og á tjaldingarøkinum



8 Klokkan 18.27 handtók løgreglan mannin. Hann legði frívilliga vápnini og lat seg handtaka av løgregluni

Váttaði tíðspunkt frá løgregluni

17:27 Løgreglan í Buskerud fær fráboðan um skot

17:30 Løgreglan í Oslo fær fráboðan um skot á Utøya

17:38 Oslo løgregluøki fær umbøn um hjálp frá Buskerud løgregluøki

17:52 Fyrsta løgregluliðið kemur til økið – mugu bíða eftir egnaðum báti

18:03 Løgreglan fær fráboðan um, at ein bátur er á veg

18:09 Servand løgreglulið úr Oslo eru komin á staðið, men bíða á meginlandinum

18:25 Servandu løgregluliðini úr Oslo stíga á Utøya

18:27 Anders Behring Breivik verður handtikin. Løgreglan letur einki skot av

Út á kvøldið leitar løgreglan eftir øðrum gerningsmonnum og fleiri bumbum. Tey, ið komu frá hendingini við lívinum, verða flutt vekk. Talið á deyðum á Utøya økist ógvusliga út á kvøldið og náttina